Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 04. desember 2020
Mál nr.: 20/00515
Málsviðgjørt: JEK

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
Stk. 2. Fyri at fáa endurgoldið meirvirðisgjaldið sambært stk. 1 skal: ... 4. TAKS hava móttikið umsóknina um endurgjald fyri inngangandi meirvirðisgjald í seinasta lagi 31. desember 2020.	Í § 3b, stk. 2, nr. 4 verður "31. desember 2020" broytt til: "31. desember 2025".
§ 3c. Tann, sum keypir motorakfar, sum er fevnt av løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum, og sum bert nýtir ravmagn ella vetni til framdrátt, kann eftir umsókn fáa endurgoldið meirvirðisgjaldið. Stk. 2. Í mesta lagi kr. 70.000 verða endurgoldnar eftir hesi grein fyri hvørt motorakfar samsvarandi við ein keypspris á 350.000, íroknað meirvirðisgjald. Stk. 3. Fyri at fáa endurgoldið meirvirðisgjaldið sambært stk. 1, skal	"**§ 3c**. Tann, sum keypir motorakfar, sum er fevnt av løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum, sum bert nýtir ravmagn ella vetni til framdrátt, kann eftir umsókn fáa part av meirvirðisgjaldinum endurgoldið. 1. pkt. er eisini galdandi fyri sonevnd plug-in hybrid akfør, PHEV. *Stk. 2*. Í 2021 og 2022 verða í mesta lagi kr. 70.000 endurgoldnar eftir hesi grein. Í 2023 og 2024 verða í mesta lagi kr. 35.000 endurgoldnar eftir hesi grein. Í 2025 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjald ikki endurgoldið.

motorakfarið vera skrásett í seinasta lagi 31. desember 2020.	*Stk. 3.* Fyri at fáa endurgoldið meirvirðisgjald eftir hesi grein, skal motorakfarið verða skrásett í seinasta lagi 31. desember 2024.”
§ 3d. Tey, sum gera íløgur í góðkendar hitapumpuskipanir til upphiting og heitt vatn í sethúsum ella bygningum, kunnu eftir umsókn fáa endurrindað meirvirðisgjaldið av íløgukostnaðinum til hitapumpu, útbúna og arbeiðsløn.	Í § 3d verður stk. 1 orðað soleiðis: “Tey, sum gera íløgur í góðkendar hitapumpuskipanir til upphiting og heitt vatn í sethúsum og bygningum, kunnu eftir umsókn fáa endurgoldið part av meirvirðisgjaldinum av íløgukostnaðinum til hitapumpu, útbúnað og arbeiðsløn. Í 2021 og 2022 verður alt meirvirðisgjaldið endurgoldið. Í 2023 og 2024 verður helvtin av meirvirðisgjaldinum endurgoldið. Í 2025 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjaldið ikki endurgoldið.”
3) samlaðu útreiðslurnar verða hildnar í seinasta lagi 31. desember 2020,	Í § 3d, stk. 3, nr. 3 verður “31. desember 2020” broytt til: “31. desember 2024”.
4) góðkend umsókn um endurrindan av meirvirðisgjaldi vera TAKS í hendi í seinasta lagi 31. mars 2021 og	Í § 3d, stk. 3, nr. 4 verður “31. mars 2021” broytt til: “31. mars 2025.”
Fyri motorakfør, skrásett sum leiguakfør, skal akfarið antin hava havt í minsta lagi 10 ymiskar leigarar, hava koyrt í minsta lagi 12.500 km og hava verið skrásett sum leiguakfar í minsta lagi 6 mánaðir, ella hava verið skrásett sum leiguakfar í minst 3 ár.	Í § 10, stk. 2, 1. pkt. verður “12.500 km” broytt til: “10.000 km”.
Við sølu av leiguakfari kann frádrátturin í mesta lagi vera 45.000 kr. í útgangandi avgjaldinum fyri hvørt leiguakfar.	Í § 10, stk. 2 verður 2. pkt. strikað.